


# Esvagt til sølu fyri fýra milliardir krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

10.03.2015 - 15:08

Oljan.fo

Søgur hava gingiðum sølu leingi, men nú skal hetta vera komiðuppá pláss. A.P. Møller ynskir at selja reiðaríi Esvagt fyri einar fýra milliardir danskar krónur. Hetta skrivarBerlingske Business. Hetta merkir at ósemjan við minnilutaeigaran kent Kirk helst er rudda av vegnum.

A.P. Møller eigur 75 prosent av Esvagt, meðan Kent Kirk og aðrir íleggjarar í Esbjerg eiga 25 prosent. Møller hevur fyrr ynskt at selja Esvagt, men tá hava Kirk og vinfólk arbeitt ímoti eini sølu. Men nú tykist hetta at vera komið uppá pláss.

Sølan av esvagt er bara ein partur av sokallaðu uppruddingini í A.P. Møller, sum stjórinNils Smedegaard Andersen, hevur sett i gongd. Hann vil selja burturav teir partarnar sum hann metir ikki hoyra heima í hesum stóra felagnum.